

NORÐOYA SPARIKASSI

# Roknskapur 2001

## Rakstrarroknskapur 2001

| | 2001 1.000 DKK | 2000 1.000 DKK |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 74.975 | 65.202 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 25.732 | 20.344 |
| **Netto rentuinntøkur** | **49.243** | **44.858** |
| Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 41 | 35 |
| Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 2.350 | 2.000 |
| Útreiðslur til kostnað og provisión | 83 | 82 |
| **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **51.551** | **46.811** |
| Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | 2.250 | 1.913 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 1.236 | 888 |
| Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 25.330 | 23.533 |
| Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 1.056 | 972 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | 352 | 213 |
| Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 4.159 | 5.562 |
| **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **24.140** | **19.332** |
| Skattur | 4.298 | 3.632 |
| **Ársúrslit** | **19.842** | **15.700** |
| **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| Ársúrslit | 19.842 | 15.700 |
| Flutt úr gávugrunni | 1.000 | 500 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 179.184 | 163.984 |
| **Til taks tilsamans** | **200.026** | **180.184** |
| Lagt í gávugrunn | 1.000 | 1.000 |
| At flyta til næsta ár | 199.026 | 179.184 |
| **Tilsamans nýtt av peningi, ið er til taks** | **200.026** | **180.184** |

## Fíggjarstøða 2001

| | 2001 1.000 DKK | 2000 1.000 DKK |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 5.522 | 5.573 |
| Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 71.083 | 47.511 |
| Útlán | 696.577 | 632.742 |
| Lánsbrøv | 263.529 | 235.875 |
| Partabrøv o.a. | 921 | 721 |
| Ítøkiligar ognir | 10.398 | 11.639 |
| Aðrar ognir | 5.534 | 3.949 |
| **Ogn tilsamans** | **1.053.564** | **938.010** |
| **Skuld og eginpeningur** | | |
| **Skuld** | | |
| Skuld til peningastovnar | 0 | 0 |
| Innlán | 836.654 | 744.009 |
| Onnur skuld | 11.236 | 8.454 |
| Burturleggingar til útreiðslur | 2.831 | 2.775 |
| **Skuld tilsamans** | **850.721** | **755.238** |
| **Eginpeningur** | | |
| Ábyrgdarapeningur | 2.817 | 2.588 |
| Gávugrunnur | 1.000 | 1.000 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 179.184 | 163.484 |
| Flutt frá ársúrsliti | 19.842 | 15.700 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **202.843** | **182.772** |
| **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.053.564** | **938.010** |
| **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| Ábyrgdir o.a. | 17.143 | 9.651 |
| Aðrar ábyrgdir | 5.424 | 8.049 |
| **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **22.567** | **17.700** |

VASTI 457171

Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík Tel: 475000 Fax: 476000 Teldupostur: ns@ns.fo www.ns.fo



## VIÐMERKINGAR

# Sambandspolitikkurin styrkir føroysku tjóðina

**Tummas Eli Høj Joensen**
*Valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Lesa vit grein 1 í stevnuskrá Sambandsfloksins, síggja vit, at tað eru ikki bara repuplikanarar, ið brúka orðið tjóð í síni polittisku stevnuskrá. Nei, Sambandsflokkurin er ein flokkur, ið altíð hevur viðurkent føroysku tjóðina, og hvat skuldu vit annað gjørt, tá vit hugsa um, okkara stolta fólk ! Latum okkum endurgeva grein 1 í stevnuskránni soleiðis, at øll tann føroyska tjóðin kann lesa, hvussu vítt hendan strevnuskráin fevnir !!

**Menning av Føroysku tjóðini**
Grein 1: Sambandsflokkurin hevur til aðalmál í rikisfelagskapinum við Danmark, at arbeiða fyri frílintari og hollari menning av Føroysku tjóðini, stjórnarliga og fíggjarliga og vil á øllum økjum reka ein framtakshugaðan politikk á kristiligum mentunargrundarlagi.

Í grein 1 verður fyri tað fyrsta sligið fast, at Sambandsflokkurin arbeiðir fyri at varveita ríkisfelagskapin, eins og tað verður hildið fram, at flokkurin innanfyri ríkisfelagsskapin vil arbeiða fyri hollari menning av Føroya fólki, stjórnarliga, fíggjarliga og mentunarliga.

**Sambandsmenn eru framskygnir**
Sambandsflokkurin var við til at orða og samtykkja Heimastýrislógina, og hann er tí eisini til reiðar at gera tær stjórnarligu broytingar , ið tæna Føroya fólki best (Føroysku tjóðini best). Vit kunnu siga, at var tað ikki soleiðis, at Sambandsflokkurin hevði samtykt heimastýrislógina, so var eingin av hesum yvirtøkunum gjørligar, ið longu eru framdar. Tí kunnu vit staðfesta, at Sambandsmenn ikki hava verið so lítið framskygnir, tá ið Heimastýrislógin var gjørd.

**Sambandsflokkurin og sjálvberandi búskapur.**
Føroyar eru eitt lítið land sammett við onnur lond og vit føroyingar hava (enn í hvussu so er), sjógvin sum størsta landsbúskaparliga álit. Sambandsflokkurin veit, eins og allir aðrir politiskir flokkar, at skulu vit hava eins góð livilíkindir sum í øðrum framkomnum londum, verður hetta trupult at klára fíggjarliga sjálvir, enn ið hvussu so er. Men; tann tíðin kemur og verður hetta skjótast framt undir Sambandsflokksins leiðslu, tí Sambandsflokkurin hevur eisini sum aðalmál, at fremja góð arbeiðisviðurskiftir fyri vinnulívið.

Hetta skal verða so, tí vinnulívið er tað ið skal framleiða okkum til sjálvberandi búskap.

Eftir at hava lisið hetta kann eingin ivið verða um, at vilt tú Føroysku tjóðini best, so er at sleppa Sambandsflokkinum frammat við næsta val.

# Pensiónistarnir aftur sleptir upp á fjall

**Atli Hansen**
*Valevni hjá Sambandsflokkinum í Eysturoy*



Tað einasta, henda samgongan tykist at kunna semjast um, er ikki ar vera samd um nakað.

Vit hava í valskeiðinum ferð eftir ferð sæð løgmann og varaløgmann draga hvør sína línu og nú kemur so landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum og fortelur okkum, at tað uppskotið til eina eftirlønarskipan, sum hann lovaði føroya fólki at leggja fyri løgtingið áðrenn útgangin av oktober mánaði 2001, nú verður av ongun. Tað er ikki ideologisk semja um at seta uppskotið fram, sigur landsstýrismaðurin.

Pensiónistarnir leggja helst lítið í, hvørjar ideologiskar hugleiðingar, íð forða fyri at bøta um teirra viðurskifti. Samgongan hevur givið eitt lyfti um í hesum valskeiðinum at koma við eini eftirlønarskipan, sum skuldi stilla okkara pensiónistar betri enn í okkara grannalondum.

Men samgongan var heldur ikki her før fyri at halda orð. Bert tóm lyfti og tað er væl skiljandi, tí annars skuldi sama samgonga út at fortelja veljarunum, hvussu hon bæðið kundi skerja blokkin við 360 mió. kr. og samstundis brúka pening til pensiónir, eldrarøkt, sjúkrahús, skúlar og m.a.

Hetta er í veruleikanum ein fyrsta játtan frá samgonguni, at skerjan av blokkinum hevur kostað vælferð. Nógv av teimum gyltu lyftum, sum samgongan hevur givið hesa seinnu tíðina, fáa helst somu lagnu sum pensiónirnar. Her er ikki peningur at gjalda við, uttan skatturin verður hækkaður ella tikið verður av fullveldisbókini.

Tað hevur ofta verið luturin hjá Sambandsflokkinum at taka upp eftir øðrum. Hetta gjørdu vit í 1994 og hetta koma vit at gera aftaná næsta val eisini og tað merkir millum annað, at vit mugu halda nøkur av teimum lyftunum, sum fullveldisflokkarnir hava givið men ikki klára at hildið aftaná 3 ár og 10 mánaðar við róðrið.

Sambandsflokkurin ætlar sær í samgongu aftaná valið, um veljarnir geva honum mandat til tað og tá fara vit — hóast skerdar fíggjarligar møguleikar — at arbeiða fyri, at okkara pensiónistar fáa somu livilíkindir sum í londunum rundan um okkum. Hetta er partur av okkara stevnuskrá og okkara sosiala engagement skal m.a. brúkast til í komandi valskeiði at fáa hesi viðurskifti upp á pláss.

Sambandsflokkurin fer tí aftaná valið at arbeiða fyri

- Hækkan av pensiónunum
- At orða ein generellan politikk á almanna- og heilsuøkinum
- Tilboð um meira ansing og røkt — alt samdøgri
- Styrking av sambýlum í nærumhvørvinum
- At útbyggja og dagføra okkara sjúkrahús
- Tað skal vera mannsømiligt fyri øll at gerast eldri í Føroyum

Hetta eru stór, ambitiøs og kostnaðarmikil mál, men við Sambandsflokkinumvið róðrið kunnu tey røkkast.

# Ein kærkomin ósemja

**Jóannes Eidesgaard**



Tað er meira sjáldan, at nakað gott spyrst burturúr einari ósemju, men eingin regul uttan undantak. Leingi hava vit vitað av, at samgonguflokkarnir høvdu trupulleikar við at finna eina semju um, hvussu ein framtíðar eftirlønarskipan skuldu skipast fyri samlaða arbeiðsmarknaðin. Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava ynskt eina sokallaða Fólkatrygging, har hvør sætar sær við egnari kapitaluppsparing, meðan Tjóðveldisflokkurin hevur ynskt eina skipan, sum bygdi á samhaldsfesti av einum ella øðrum slag. Og hóast samgongan hevur sitið uppiyvir hesum máli í skjótt fýra ár, so kom tíbetur einki burturúr.

Og tí skal eg vera tann fyrsti at ynskja Tjóðveldisflokkinum tillukku við, at teir megnaðu at forða fyri einari Fólkatrygging eftir fólkafloksleisti, sum hevði verið ein sonn ólukka fyri eina framtíðar eftirlønarskipan. Takk skulu teir hava fyri tað. So ein ósemja kann eisini medvirka til nakað positivt hóast alt, og eftir er so bert at vóna, at ein veruliga samhaldsføst eftirlønarskipan um ikki ov drúgva tíð sær dagsins ljós.

Ónsdagin í seinasu viku boðaði landsstýrismaðurin á amanna- og heilsumálum frá, at eingin nýggj eftirlønarskipan kemur í hesum valskeiðnum. Hetta var skilabesta avgerð, sum henda samgongan hevur tikið í langa tíð. Hetta var ein góður dagur ikki bert fyri verandi pensjonistar, men kanska serliga fyri framtíðar pensjonistar.

Fyri góðum fýra árum síðani var eg rættiliga ivasamur, tí tað bar á tað borðið, at tað ikki fór at eydnast at fáa ein meirluta fyri einari samhaldsfastari eftirlønarskipan. Hinir politisku flokkarnir vóru heldur trekir at taka undir við okkara grundhugsan í hesum máli um eina skipan, har serliga tann Samhaldsfasti skuldi verða grundarsteinurin. Men tíðin hevur so broytt hesi viðurskifti. Og her er tað serliga støðan hjá Sambandsflokkinum, sum hevur yvirraskað okkum sera positivt. Sjálvt um vit øll minnast orðini hjá Edmund Joensen á sinni, tá hann segði, at hann ynskti Samhaldsfasta, har piparið grør, so er støðan tann í dag, at Sambandsflokkurin fult og heilt saman við Javnaðarflokkinum stuðlar tí Samhaldsfasta.

Og tí er eisini vón fyri, at ein nýggja samgonga hevur møguleika at gjøgnumføra ein pensjónsreform, sum veruliga kann gerast eitt politiskt gjøgnumbrot, har føroyskir pensjonistar fáa virðiligar sømdir.

Hetta stríðið í samgonguni tók so fýra ár til tess at fáa greiðu á, at man ikki fór at gerast samdur. Men tað er heldur ikki ókent frá øðrum málum, men lat tað fara á hesum sinni.

Tað er eisini av størsta týdningi, at tey feløg á arbeiðsmarknaðinum, sum enn ikki hava fingið eftirlønarskipanir fyri sínar limir, fáa at vita, hvør politiska støðan er. Hesumeðin valið hendir so tíbetur einki, men útlitini fyri at nakað hendir skjótt í einari komandi samgongu, eru rættiliga góð. Fólkatryggingin hevur fingið sín deyðadóm, men tað lýsnar fyri einari samhaldsfastari eftirlønarskipan, um vit fáa einna nýggja samgongu eftur valið.

Ein nýggj samhaldsføst eftirlønarskipan hevur neyvan ligið nærri enn júst nú.